# Trendy at hugna sær um jólini

**Rannvá Troest, sum arbeiðir á kunningarstovuni í Runavík sigur, at tiltøkini, ið tey hava skipað fyri í desember mánaði, hava verið framúr væl vitjað. Betur enn nakrantíð áður**

JÓLAHUGNI
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

Kunningarstovan í Runavík hevur aldri upplivað so stóra undirtøku við tiløkunum, sum tey hava skipað fyri og selt billettir til í desember mánaði, sum í ár. Rannvá Troest, sum starvast á Kunningarstovuni í Runavík sigur, at hon metir, at tað er komin trendur í at hugna sær.

– Vit merkja týðuliga at fólk fara út at hugna sær, í staðin fyri at stressa, sum tey kanska hava gjørt undanfarin ár, sigur Rannvá.



*Allastaðni, har teir steðgaðu, savnaðu jólamenninir, sum koyrdu runt í Eysturoynni við brandbilum, nógv fólk. Men Runavík mundi eiga metið. Har vóru heili 1000 fólk samankomin, fyri at hitta jólamenninar.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Gott samstarv

Eina góða orsøk til tað heldur hon vera, at øll tiltøkini hava verið sera væl fyrireikað í ár.

– Tað hevur verið eitt sera gott samstarv ímillum kommununa, Handilsmiðdepilin, handlarnar og Kunningarstovuna, bæði hvat viðvíkur vinnuligum tiltøkum, men eisini viðvíkjandi mentanarligum tiltøkum. Vit hava samstarva fyrr, men tað vísir seg, at tað tekur fleiri ár at byggja eitt tílíkt tiltak upp, soleiðis at fólk tíma at koma, greiðir Rannvá fra, at staðfestir, at tað liggur eitt stórt arbeiði í hugnaliga desember mánaðinum.

– Tá vit høvdu langan leygardag vóru sera nógv fólk. Tá komu eisini jólamenninir koyrandi á brandbilunum, og bara her í Runavík savnaðu teir 1000 fólk. Eg veit eisini, at teir vóru sera væl móttiknir alla staðni runt um í Eysturoynni, greiðir Rannvá frá.

### Konsertir

Rannvá sigur, at tað, sum kanska yvirraskaði tey mest, var sera væleydnaða tiltakið, sum Symfoniorkestrið skipaði fyri.

– Vit vóru eitt sindur skeptisk, tí tað skuldi vera inni í eini høll. Men tá avtornaði seldu vit 300 atgongumerki í forsølu, og inni í høllini vóru tilsamans 450 fólk, sigur Rannvá.

Hon sigur, at ljóðgóðskan var sera góð, og at Symfoniorkestrið lingu hevur umbiðið høllina aftur komandi ár, til eitt líknandi jólatiltak.

Eisini hava ymiskar aðrar konsertir verið runt um í Eysturoynni, millum annað var ein í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, við Atlantic Songbirds, ið varð útseld.

### Veðrið ávirkar

Eitt, sum tó kanska ikki hevur verið heilt eftir vild hendan desember mánaðin, er veðrið. Og tað hevur eisini havt sína ávirkan.

Ætlanin var, at jólaskipið skuldi leggja at týsdagin, men tá var ikki hugsingur um at leggja nakað skip fyri veður. So tað mátti útsetast til mikudagin í staðin. Men slíkar seinkingar má man bara smyrja seg við, tá man býr í Føroyum, sigur Rannvá at enda flennandi.

# Singer/songwriter í Fuglafirði

**Tollaksmessukvøld verður ein áhugaverd konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Vinnarin av singer/songwriter kappingini í ár, Rókur Jacobsen, vinnnarin frá í fjør, Kristleif Zachariassen, og Knút H. Eysturstein fara allir á pall í Fuglafirði 23. desember**



Rókur Jacobsen, Kristleif Zachariassen og Knút H. Eysturstein fara allir at framføra við hvør sínum bólki Tollaksmessukvøld.

Rókur syngur og spælir kassagittar. Hann fer millum annað at framføra egin løg, sum hann eisini framførdi á singer/songwriters kappingini. Á palli saman við Róki verða kendir tónleikarar sum Rói Christiansen og Halgir Arge, sum báðir hava spælt saman við Róki í bólkinum Tangz.

Bæði Kristleif Zachariassen og Knút H. Eysturstein eru í løtuni fløguaktuellir, og teirra framførslur verða serliga merktar av tónleiki av nýútkomnu fløgunum.

Kristleif, sum vann Singer/songwriter kappingina í fjør, verður heldur ikki einsamallur á pallinum. Sjálvur fer hann at syngja og spæla guitar, og afturat sær hevur hann kendar menn sum Rógva á Rógvu, Mikael Blak og Heðin Ziska Davidsen.

Knút H. Eysturstein syngur, spælir el- og kassagittar umframt Juno–ljómborð. Á pallinum við Knúti verða Uni Árting, Niels Jákup í Jógvanstovu, Bogi á Lakjuni og Halltóra Henriksen.

Fyrireikararnir halda, at konsertin kanska serliga er eitt gott høvi hjá útisetum og øllum øðrum við at uppliva tríggjar av okkara frægu singer/songwriter tónleikarum á sama palli.

Konsertin byrjar kl 20.00. Atgongumerki á 100 kr. verða at fáa við dyrnar.

Møguleiki verður eisini at ognað sær nýggju fløgurnar hjá Knúti og Kristleifi á konsertini.

**– eys –**

# Jólahugnakvøld í Kelduni

**Tollaksmessukvøld verður eitt alment jólahugnakvøld í Kelduni í Skálabotni. Tiltakið hevur fingið heitið »Vit syngja jólini inn«**

Tollaksmessukvøld kl 21.00 verður høvi hjá øllum áhugaðum at leggja sær leiðina framvið Kelduni í Skálabotni, har tey fara at syngja jólini inn. Talan verður um eitt alment jólahugnakvøld við felagssangi, lovsangi og sangframførðslum.

Aftaná verður kaffi við rís a'la mande at fáa.

Í Kelduni siga tey, at tiltakið er ókeypis, men at innsavnað verður fyri missiónsarbeiðnum hjá Kelduni.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**– eys –**

# Fólk og Dólgar aftur útselt

**Tað gekk ikki long tíð, frá at Kunningarstovan í Havn byrjaði at selja atgongumerki, og til alt var útselt. Tí var avgjørt at hava nakrar eykasýningar, men tær eru eisini so væl og virðiliga útseldar**

SJÓNLEIKUR
*eydna@sosialurin.fo*

Tað var kanska nakað órættvíst, at atgongumerkini til vælumtókta sjónleikin um Fólk og Dólgar einans vórðu seld í Havn. Tey vóru nevniliga útseld eftir stuttari tíð, og tað gav ikki bygdarfólki nakran møguleika at keypa atgongumerki. Tá avgjørt varð, at hava nakrar eyka sýningar var tí eisini avgjørt, at atgongumerkini skuldu býtast út til Kunningarstovurnar kring landið at selja.

Á Kunningarstovni í Runavík siga tey, at atgongumerkini, tey fingu, vórðu útseld eftir lítlari løtu.

– Tá vit komu til arbeiðis tann morgunin, var long bíðirøð frammanfyri Kunningarstovuni. Tað stóðu sera nógv fólk og bíðaðu, til vit lótu upp. Men vit høvdu bert fingið 100 atgongumerki at selja, og tað var skjótt at tey vóru uppi. So tað vóru ikki eingang øll, sum stóðu í bíðirøð allan morgunin, sum fingu atgongumerki, siga tey úr Runavík.

Tey siga, at um so verður, at eyka-eyka sýningar fara at verða sýndar, so vóna tey, at fáa nøkur fleiri atgongumerki inn til Runavíkar at selja.

Vit sleppa so í øllum førum av við tey, siga tey flennandi.

Tað eydnaðist tó ikki Sosialinum at fáa uppspurt, um eyka eyka sýningar fara at verða sýndar í komandi ári.